15.04.2015 / ahn

## Fólk við menningartarni á arbeiðsmarknaðinum

Javni hevur vent sær til Hagstovuna fyri at vita

*"....hvussu vit kunnu fáa hagtøl sum viðvíkja fólki við menningartarni á arbeiðsmarknaðinum.*

*Javni metir, at fólk við menningartarni kunna luttaka á arbeiðismarknaðinum í nógv størri mun, enn tey gera í dag. Tað er millum annað fyri at fáa gongd á eitt kvalificerað kjak í almenninginum um hettar, at vit meta, at tað er neyðugt við einari lýsing av, hvussu støðan er nú. Vit vita, at tað eru nøkur, sum eru á arbeiðsmarknaðinum undir ymsum treytum og tað er vitan um hesi vit ynskja at fáa.T.d. Hvussu nógv fólk við menningartarni eru knýtt at almenna og privata arbeiðsmarkna-ðinum? Hvussu verða tey lønt? Fáa tey fyritíðarpensjón (lægstu, miðal, hægstu)? Fáa tey onkra samsýning, heldur enn løn? Hvørja samsýning? Hvussu eru tey tryggjaði? Hvørji atlit tekur arbeiðsplássið fyri, at hetta eru fólk, hvørs kognitivi førleiki er skerdur? Er nøkur stuðulsskipan knýtt at setanini?*

*Annað, sum er áhugavert er at fáa vitan um er, hvørja vitan arbeiðsgevarar hava um lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk ..."*

Nakað fullfíggjað yvirlit yvir fólk við menningartarni finst ikki, eins og tað kann vera torført í verki at nágreina nær talan er um menningartarn ella ikki.

Tá Almannaverkið metti, at tað eftir øllum at døma vildi verið lutfalsliga lætt at eyðmerkja heilt stóran part av populatiónini – fólk við mennigartarni – við at gjøgnumganga visitatiónsmálini hjá Almannaverkinum, var semja um at í fyrstu atløgu verður roynt at gera eina lýsing av

- hvussu nógv tey eru, sum eru menningartarnaði
- hvussu nógv teirra eru á arbeiðsmarknaðinum og ella arbeiða á vardu verkstøðunum
- teirra inntøkuviðurskifti
- býtið eftir aldur, kyn, øki og eftir vinnugrein

við støði í einum visitatiónsyvirliti frá Almannaverkinum og út frá fólka-, arbeiðsmarknaðar- og skattaskráunum á Hagstovuni.

Spurningarnir um "samsýning, heldur enn løn", tryggingarviðurskifti, atlit og stuðulsskipanir og kunnleikan hjá arbeiðsgevarunum til teir møguleikar, sum lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk gevur, vera so at bíðja til eitt møguligt seinni umfar.

## Stakroyndin og eftirviðgerðin

Gjøgnumgongdini av visitatiónsmálunum á Almannaverkinum gav eitt yvirlit við gott 500 persónum.

Einstakir persónar eru í visitatiónsyvirlitinum, sum eyðsýniliga eru visiteraði av øðrum orsøkum enn menningartarni. Onkrir "skeivleikar" vóru eisini í listanum. P-tøl eru førd í listan við hond, og til bar ikki at finna nøkur P-tøl aftur í fólkaskránni. Eftir ávísa editering er endaliga talið á persónum í stakroyndini sostatt 481 persónar. Av teimum eru 360 millum 18 og 66 ár, ein møgulig avmarking av árunum, ein vanliga er á arbeiðsmarknaðinum. Aldur, kyn og bústaður eru fingin til vega við uppslagi í fólkaskránna, og har dagfestingin er miðjan november 2014, tá Hagstovan fekk yvirlitið frá Almennaverkinum (Talvur 1 og 2).

Vinnugreinar, lønarinntøkur og almannaveitingar er funnin úr løntakaraskrá og samtíðarskattaskrá (Talvur 3, 4 og 5).

Inntøkutølini eru samlaðu inntøkurnar hjá tí einstaka fyri árið 2014. Tað kemur fyri at fólk innan fyri eitt ár fáa fleiri einn eitt veitingarslag og/ella hava verið í starvi hjá fleiri arbeiðsgevarunum, so vinnugrein og veitingarslag eru vald eftir tí vinnugrein ella veitingarslag, ið telur mest í krónum (Talvur 4 og 5).

Bólkingin av vinnugreinum í talvu 5 er gjørd eftir FV2008 (Føroysk vinnugreinaflokking 2008). FV2008 er Føroyska útgávan av vinnugreinaflokkingini hjá NACE hjá EU. Gevið gætur, at arbeiðsplássini innan vinnugreinina "Q Heilsu- og almannaverk" í allarflestu førum eru vardu verkstaðirnir, eitt nú verkstøðini Vón og á Bakka.

Fyri at halda "anonymiserings" ásetingarnar hjá Hagstovuni hevur í førum verið neyðugt í talvunum at leggja bólkar saman, so at tað slepst undan at hava færri enn 3 fólk í einum bólki.

Tað at neyðugt hevur verið at leggja nakrar persónar burturúr upprunaliga yvirlitinum, har tey eyðsýniliga ikki eru hava menningartarn, reisir sjálvsagt spurningin um hvussu umboðandi úrvalið er.

Javni vísir tó á at talið 481, umleið 1% av fólkatalinum í Føroyum, svarar nøkulunda til tað sum Sosialstyrelsen upplýsir á sínari heimasíðu um fordeilingina í Danmark og øðrum londum (http://www.socialstyrelsen.dk/handicap/udviklingshaemning/om-udviklingshaemning/udviklingshaemning-i-tal). Og LEV, felagið fyri menningatarna í Danmark, metir fordeilingina at vera ~0.7% (http://www.lev.dk/om-lev/hvad-er-udviklingshaemning/udviklingshaemning-i-tal/).

At enda, so er tað uppgávan hjá Hagstovuni at leggja fram tølini, og upp til onnur mugu tulka tey.

# Hagstova Føroya

## Statistics Faroes

## Nøkur úrslit

| Talva 1. Fólk í stakroyndini, eftir aldri og kyni | | | |
|---|---|---|---|
| | Konufólk | Mannfólk | Tilsamans |
| **1. Undir 18 ár** | **27** | **78** | **105** |
| **2. Millum 18 og 66 ár** | **162** | **199** | **360** |
| 2. 18-19 ár | 7 | 16 | 23 |
| 3. 20-29 ár | 40 | 51 | 91 |
| 4. 30-39 ár | 26 | 35 | 61 |
| 5. 40-49 ár | 38 | 36 | 74 |
| 6. 50-59 ár | 32 | 29 | 61 |
| 7. 60-66 ár | 19 | 31 | 50 |
| **3. 67 ár og eldri** | **7** | **9** | **16** |
| **Tilsamans** | **196** | **285** | **481** |

| Talva 2. Fólk í stakroyndini, eftir øki og kyni | | | |
|---|---|---|---|
| | Konufólk | Mannfólk | Tilsamans |
| 1. Norðuroyggjar | 24 | 40 | 64 |
| 2. Eysturoy | 47 | 62 | 109 |
| 3. Streymoy | 6 | 12 | 18 |
| 4. Tórshavn | 88 | 131 | 219 |
| 5. Vágar | 13 | 11 | 24 |
| 6. Sandoy ella uttanlands | 7 | 4 | 11 |
| 7. Suðuroy | 11 | 25 | 36 |
| **Tilsamans** | **196** | **285** | **481** |

| Talva 3. Fólk í stakroyndini, eftir slag av veitingarinntøku og kyni | | | |
|---|---|---|---|
| **Row Labels** | **Konufólk** | **Mannfólk** | **Tilsamans** |
| Hægsta avlamispensjón | 113 | 164 | 277 |
| Miðal ella lægsta avlamispensjón | 7 | 5 | 12 |
| Forsorgarhjálp, arbeiðsfremjandi tiltøk o.a | 35 | 25 | 60 |
| Fólkapensjón ella onnur eftirløn, ALS ella aðrar tryggingarveitingar | 10 | 7 | 17 |
| Barnapengar | 5 | 14 | 19 |
| Ongar veitingar | 26 | 70 | 96 |
| **Tilsamans** | **196** | **285** | **481** |

**Talva 4. Tey 18 – 66 ára, ið hava lønarinntøku, bólkaði eftir slag av veitingarinntøku**

| | Í tali | Við lønar-inntøku | Meðal inntøka (1000 kr.) |
|---|---|---|---|
| Hægsta avlamispensjón | 274 | 125 | 11 |
| Miðal ella lægsta avlamispensjón | 12 | 5 | 34 |
| Forsorgarhjálp, arbeiðsfremjandi tiltøk o.a | 59 | 17 | 79 |
| ALS, aðrar tryggingarveitingar, fólkapensjón ella onnur eftirløn | 4 | 3 | 78 |
| Ongar veitingar | 11 | 5 | 139 |
| **Tilsamans** | **360** | **155** | **25** |

**Talva 5. Meðal lønarinntøkan í 2014 hjá teim 18 – 66 ára gomlu, sum hava lønarinntøkur, eftir vinnugrein**

| | Í tali | Meðal inntøka (1000 kr.) |
|---|---|---|
| A Landbúnaður, skógrøkt og fiskiveiða og C Framleiðsluvinna | 4 | 50 |
| E Vatnveiting, kloakkir og ruskviðgerð og F Byggivinna | 4 | 63 |
| G Heil- og smásøla og umvæling av akførum | 15 | 49 |
| H Flutnings- og goymsluvinna | 4 | 122 |
| I Gisting og matstovuvinna | 3 | 39 |
| J Kunning og samskifti og M Serkøn, vísindalig og tøknilig ráðgeving og S Aðrar tænastuveitingar | 3 | 67 |
| O Almenn umsiting, verja og lógarkravdar sosialtryggingar | 12 | 75 |
| Q Heilsu- og almannaverk | 110 | 9 |
| **Tilsamans** | **155** | **25** |